Fýrverk í oyggjauppgerð

Bæði gøtumenn og toftamenn misnýttu upplagdar møguleikar, og so endaði tað málleyst

GÍ–B68
Jóannes Hansen

Einki mál kom í Gøtu mikukvøldið. Tað var kortini ikki tí, at tað skortaði upp á møguleikar. Men teir vóru ikki gagnnýttir.

B68 hevur havt stórar trupulleikar at skora mál í ár, og heldur ikki mikukvøldið eydnaðist tað. Men teir høvdu viljan til at arbeiða við at skapa møguleikar. Í útgangsstøðuni vóru teir tríggir á toppinum. Dánial Hansen, sum higartil hevur verið í B68 verjuni, var fluttur fram á álopsplássið í høgru.

At B68 var so álopssinnað hevði við sær, at heimamenninir noyddust at broyta eitt sindur upp á sína uppstilling. Eitt nú varð Hans Pauli Petersen togaður aftur av miðvallarplássinum í høgru.

B68 hevði bólti meiri í fyrra umfarinum, og bólturin var nógv á helvtini hjá heimaliðnum. Men tað gekk striltið hjá B68 at finna vegin til upplagdar málmøguleikar. Ofta løgdu teir innfyri, men tað var sjáldan, at tað vóru teir reyðu, sum møttu innleggunum.

Jóhan Petur Poulsen snittaði frísparksinnlegg á tvørtræið og upp um, og Súni Fríði Johannesen hevði hevði ein góðan stútara, sum málverjin bjargaði væl.

Símun steðgaði

GÍ hevði serliga í 1. hálvleiki hug til at halda nógv fólk aftanfyri bóltin. Men tað vildi ikki siga tað sama sum at teir ikki høvdu eyga fyri álopsspælinum. Heldur var tað soleiðis, at teir lúrdu eftir møguleikanum at fara í skjótálop, og onkra ferðina var um reppið, at tað eydnaðist.

Besta møguleikan fekk Símun Samuelsen, tá ið B68 rangstøðufellan og ungi maðurin var einsamallur á veg ímóti B68 málinum. Men Símun, sum hevði møguleika at spæla tvørturum til Popczynski, steðgaði á. Hann mundi halda, at linjuverjin og dómarin høvdu dømt hann rangstaddan. Tað høvdu teir ikki, og harvið hvarv besti møguleikin hjá GÍ í fyrra umfarinum.

Meiri rótut

Eftir steðgin var eingin munur á liðunum. Bólturin ferðaðist fyri tað mesta millum brotsteigarnar. Talan var um nógvar nærdystir og ikki so skipað spæl, og uppløgdu málmøguleikarnir vóru ikki nógvir.

Besta møguleikan at skora mál fyri B68 fekk Jóhan Petur Poulsen. Hann varð spældur púra blankur, og hann hevði góða tíð, tá ið málverjin hjá GÍ kom út á brotsteigarmarkið at verja fyri. Ungi maðurin royndi at lyfta upp um málverjan, og tað eydnaðist. Trupulleikin var bara, at bólturin í staðin fyri at fara í tóma málið datt niður á tvørtræið, og so kom B68, sum síðsta korterið setti Øssur Hansen, ið var illa til passar og tískil ikki var millum teir fyrstu ellivu, á vøllin, ikki nærri at gera mál.

Besta møguleikan at avgera heimaliðnum til fyrimunar fekk Krystof Popczynski sjálvur. Hann rann frá B68 verjuni, men Albert Sævarsson vísti enn eina ferð, at hann er ein sannur knassi millum stólparnar og ikki minst úti í brotsteiginum.

Javnleikurin var tann fimti hjá B68 í átta royndum. B68 vísti, at teir vildu gera nakað við trupulleikarnar, sum teir hava havt við at fáa mál – bara seks mál í átta dystum – men tað eydnaðist ikki. Eftir rættuliga strævna viku við Intertoto Cup ferðing og tapi á Mølini tóktust teir í GÍ ikki at hava so nógv ímóti, at tað eydnaðist at fáa stig, sjálvt um tey ikki vóru so nógv.

GÍ–B68 0–0
Dómari: Suni Johansen
GÍ: Jazek Przybylski – Áslakur R. Petersen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen–Hans Pauli Petersen, Símun Louis Jacobsen, Súni Olsen, Gidek (Høgni Madsen, 63.), Bárður á Lakjuni – Símun Samuelsen (Jónreid Dalheim, 70.), Krzystof Popczynski
B68: Albert Sævarsson – Arnbjørn Danielsen, Hans Fróði Hansen, Jákup Eli Olsen – Bogi Petersen, Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, John Heri Dam (Øssur Jacobsen) – Dánial Hansen, Súni Fríði Johannesen, Jóhan Petur Poulsen (Øssur Hansen, 75.)

Rennikapping á Varmakeldu

Leygardagin 5. juli verður skipað fyri rennikapping á Varmakeldustevnuni í Fuglafirði.

Kappast verður í ymsum bólkum bæði hjá vaksnum og børnum. Startur og mál í øllum kappingum eru á havnalagnum við P/F Petur Larsen.

Øll eru vælkomin at luttaka í kappingunum, ið bæði eru einstakar kappingar og partur av Grand Prix kappingini í renning, sum Frælsur Ítróttur Føroya skipar fyri.

Luttaka í samlaðu Grand Prix kappingini kunnu bert limir í einum av teimum trimum feløgunum fyri frælsan ítrótt. Til ber at tekna seg sum lim, tá meldað verður til á heimasíðuni www.athletics.fo. Grand Prix kappingar hava verið Flaggdagin, á Norðoyarstevnu og á Skálafjarðarstevnu í Runavík. Umførini, ið eru eftir, vera á Vestanstevnu og á Ólavsøku.

Byrjað verður kl. 10.30

Kappingin byrjar kl. 10.30, tá vaksin renna 5 km. Runnið verður 5 ferðir runt eina leið, sum gongur frá P/F Petur Larsen, niðan á Bakkaveg, norður eftir Bakkavegi, oman aftur á havnalagið við Landingarhúsið, og síðan suður eftir havnalagnum til P/F Petur Larsen.

Høast øll tey vaksnu byrja í senn, fevnir kappingin um tveir aldursbólkar: vaksin (menn og kvinnur f. 1958-1985), og veteranar (menn og kvinnur f. - 1957). Vinnararnir fáa steyp, og nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerki.

Børnini byrja kl. 11.00, tá dreingir -7 og gentur -7 (f.1996 ella seinni) renna 500 m. Síðani renna dreingir -10 og gentur -10 (f.1993-1995) sama tein. Runnið verður frá vegnum áraka P/F Petur Larsen og norður eftir keiini, har vent verður um eina keylu.

Tey størru børnini renna eftir somu leið, sum tey vaksnu. Tó verður bert runnin ein runda, sum er 1 km. Kappast verður í hesum bólkum: dreingir -13 og gentur -13 (f. 1990-1992) og dreingir -17 og gentur - 17 (f. 1986-1989).

Heiðursmerki og steyp

Nummar 1, 2 og 3 í øllum bólkum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki.

Tilmelding online

Tey, ið ætla sær at luttaka, skulu melda til á heimasíðuni hjá Frælsum Ítrótti Føroya www.athletics.fo innan fríggjakvøldið 4. Juli kl. 18.00. Tað ber tó eisini til at melda til við P/F Petur Larsen, hálvan tíma áðrenn kappingin byrjar.

Luttøkugjald er kr. 30,- fyri vaksin og kr. 20,- fyri børn. Hetta verður goldið, tá nummarið verður avheintað, beint undan kappingini.

Skála gjørdi ein orduligan vørr

Ímóti viljaleysum vágamonnum eydnaðist teimum at skora tvífalt so nógv mál, sum teir høvdu fingið í átta ferðir 90 minuttir

SKÁLA–FS VÁGAR
Jóannes Hansen

Tað var gott lag á Skála mikukvøldið, og minurnar vóru einki serligar hjá vágamonnum, tá ið teir vóru á veg til hús aftur. Hugburðurin hjá báðum pørtum var væl skiljandi. Vágamenn høvdu roknað við torførari uppgávu á Skála, og tað var kanska ikki heilt óvæntað, at teir taptu. At teir ikki vóru heilt álvuligir við støðuna mundi meiri koma av mátanum, sum teir høvdu tapt uppá. Stutt sagt so hevði liðið hjá teimum ikki sýnt rætta hugburðin og viljan, sum skal til. Tí kann ikki sigast, at tað sær ljóst út undan vitjanini av væl uppløgdu NSÍarunum.

At lagið var gott á Skála var so sera lætt at skilja. Eftir at hava spælt átta ferðir hálvan annan tíma og einki stig at hava fingið og bara at hava fingið tvey mál, gjørdu teir hesa ferð rættuliga bart. Skálamenn høvdu rætta viljan og áræðið, sum skal til fyri at vinna dystir og stig, og teir megnaðu í leysum spæli at skora fýra mál ella tvær ferðir samlaða talið í átta teimum fyrstu royndunum í landskappingini í ár.

Javnt fyrstu løtuna

At heimaliðið fór at vinna greiðan sigur sást ikki beinanvegin. Gestirnir, sum høvdu Jens Erik Rasmussen sum hangandi álopsspælara, vóru væl fyri fyrsta korterið, tá ið teir høvdu fitta lotið undan, og tað var onkra ferðina um reppið, at teir spældu seg til møguleika.

Men so við og við fekk heimaliðið tak á miðvallarspælinum. Julian Floresco var sera væl upplagdur, og tað var góður styrkur, at Marius Joensen, sum er komin heim av flatlondum í summarfrí, var vongverji í vinstru.

Í álopinum var Bogi Gregersen, sum frammanundan var rættuliga ivasamur, tikin framum Alexander Johansen, sum slapp at hvíla seg á beinkinum allar 90 minuttirnar (Skála framdi onga útskifting). At valið fall á Boga vísti seg at vera skilagott, tí hann var stak væl upplagdur.

Arnhold Berg var við í báðum teimum fyrstu málunum. Á hálva tímanum stútaði hann hornasparksinnlegg úr høgru í málið aftanfyri Jákup Joensen, og fimm minuttir seinni helt hann so mikið nógv í egnum brotsteigi, at Niklas á Líðarenda kendi seg noyddan at bríksla fyri brotssparki og at geva miðverjanum gula kortið. Sum altíð so var Jens Erik Rasmussen tryggur úr ellivu metrum.

Heimaliðið greitt omaná

Eftir steðgin var eingin ivi um, hvønn veg stigini høvdu kós. Skála var leikliga greitt omaná, og teir spældu seg til fleiri møguleikar. Miðvallarin í høgru, Hanus Thorleifsson, legði heimaliðið framum, tá ið 2. hálvleikur var tíggju minuttir gamal. Eftir frísparksinnlegg úr vinstru var hann púra leysur við handara stólpan og takkaði fyri.

Og so var tað, at Bogi Gregersen skoraði tvær ferðir. Tá var farið at tynnast í FS Vágar verjuni. Jóhannis Joensen, sum tá ið støðan var 2–1 sendi fríspark í uppstandaran, var farin fram, og tað var tunnligt, tá ið Bogi fekk møguleikarnar og við tveimum málum syrgdi fyri, at fótbóltshýrurin á Skála verður betri í summarsteðginum, enn hann hevur verið tær síðstu nøgvu vikurnar. Og tað verður hann uttan mun til, hvussu tað fer at hilnast á Eiði sunnudagin.

Skála–FS Vágar 4–1 (1–1)
1–0: Arnhold Berg 30.
1–1: Jens Erik Rasmussen br 35.
2–1: Hanus Thorleifsson 56.
3–1: Bogi Gregersen 65.
4–1: Bogi Gregersen 84.
Dómari: Niklas á Líðarenda
Skála: Eugen Voda – Agnar Højgaard, Arnold Berg, Dusan Jaic, Marius Joensen – Hanus Thorleifsson, Pauli G. Hansen, Alexander Jovevic, Julian Floresco – Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen
Gult kort: Arnhold Berg og Julian Floresco
FS Vágar: Jákup Joensen – Sjúrður Ellefsen, Jóhannis Joensen, Vlad Osipovs (Jpohn Johansen, 88.), Silva de Braga (Birgir Joensen, 75.) – Jógvan H. Samuelsen (Bjarni Prior, 46.), Rói Árting (Birgir Joensen, 86.), Jens Erik Rasmussen, Ruslan Screlea, Elfinn Ørvarodd – Clayton Soares
Gult kort: Jógvan H. Samuelsen 67., Jákup Joensen 90.

VB-EB/Streymur 1-1 (0-0):

Vágbingar mistu aftur á stokkinum

Inntil tríggir minuttir vóru eftir at spæla hevði VB trý stig í skjáttuni, men EB/Streymur megnaði at javna og varðveita munin niður til VB

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

Magni á Lakjuni og Michael í Lágabø í hornatøkum. Dysturin á Eiðinum endaði við javnleiki 1-1
MYND: Áki Bertholdsen

Eftir sigurin á Skála høvdu vágbingar aftur fingið meira áræði og sjálvsálit, men hetta bleiv knúst í dystinum móti EB/Streymi á Eiðinum mikukvøldið.

Útiliðið fekk útjavnandi málið í teimum seinastu minuttunum av dystinum, og tí liggur VB enn undir strikuni í stigatalvuni.

Dysturin var ikki serliga væl spældur, og spælið var heldur óskipað og tilvildarligt, men tvey mál og tvey reyð kort hevði dysturin tó at bjóða áskoðarunum sum undirhald.

VB hevði fleiri málmøguleikar enn gestirnir, og í fyrra hálvleiki endaði ein skallari á stongini, men hepnið var ikki við vágbingum ta ferðina.

Kulic skorar

Milan Kulic, sum skoraði síðsta sunnudag, fekk aftur eitt mál hesferð. Tá umleið ein tími var farin, fekk VB frísparl uttanfyri brotsteigin. Milan Kulic skeyt flatt móti málinum, og bólturin bar við Ronnie Samuelsen, sum stóð í múrinum. Gunnar á Steig í málinum bleiv snýttur av hesum og fekk ikki bjargað.

Tá tjúgu minuttir vóru eftir at spæla sendi dómarin tveir leikarar av vøllinum. Teir vóru leikandi venjarin Predrag Ziskovic og Magni á Lakjuni.

Magni fær bóltin á miðjum vølli, men verður takklaður aftanífrá av Predrag, sum kemur stormandi inn í Magna. Ein sera ljót takklíng, sum jugoslavin fekk beinleiðis reytt kort fyri. Magni gerst so illur um takklingina, at hann hevnir seg onkursvegna. Hetta sær linjuverjin og boðar dómaranum frá, og hann sendir báðar úr brúsuna.

Hetta er aðru ferð, at teir báðir hava fingið reytt kort. Predrag Ziskovic fekk reytt í dystinum í Klaksvík, og Magni fekk reytt kort í bólkaspælinum í steypakappinginum. Tað skal eisini nevnast, at Magni á Lakjuni ongantíð hevur fingið reytt kort fyrr enn í ár.

Tað eydnaðist EB/Streymi at fáa útjavnandi málið stutt fyri leiklok. Tað var trunkaspæl í brotsteiginum hjá VB, og verjan fekk ikki beint hann orduliga burtur. Ronnie Samuelsen fangar bóltin úti í síðuni, og saksasparkar bóltin inn aftur í brotsteigin, har Gert Hansen setir høvdið á bóltin, og so var 1-1.

Hetta var fyrsta málið hjá Gert í 1. deild í hansara triðja dysti í bestu deildini. Gert er kollfirðingur og er liðformaður á unglingaliðnum hjá EB/Streymi.

Næstu ferð tekur EB/Streymur ímóti Skála, og VB skal inn á Toftir at møta B68.

VB-EB/Streymur 1-1 (0-0)
1-0: Milan Kulic
1-1: Gert Hansen
VB: Bjarni Johansen - Dejan Nicolic,Predrag Ziskovic, Slobodan Madzar, Michael í Lágabø - Milan Kulic, Dan Djurhuus, Palli Augustinussen, Mortan úr Hørg - Jón Pauli Olsen, Birgir Jørgensen
EB/Streymur: Gunnar á Steig - Eyðfinn Joensen, Gert Hansen, Egil á Bø, Hallur Jacobsen - Hans Pauli Samuelsen, Marek Viersbicki, Ronnie Samuelsen, Marni Djurhuus - Magni á Lakjuni, Sorin Anghel